

Høvdu vónir um at vinna sær pening burturúr oljuíløgum, men tað kann man ikki gera í feløgum sum ein hevur eftirlit við.

# Hava partabrøv í oljufeløgum sum tey hava eftirlit við

**Jógvan Hugo Gardar**

15.03.2015 - 15:53

Oljan.fo

Fýra av átta stjórum í oljufelagnum Petoro, sum norski staturin eigur, eiga partabrøv í Statoil, skrivar sysla.no. Aðalstjórin, Grethe Kristin Moen, sigur at hon skal selja síni partabrøv. Oljumálaráðið visti ikki um at stjórarnir áttu í Statoil.

Høvuðsuppgávan hjá Petoro er at tryggja at inntøkurnar hjá norska landskassanum gerast so høgar sum gjørligt frá olju og gassi. Felagið skal eisini ansa eftir søluni av gassi og olju sum Statoil selur av norska landgrunninum.

Petoro-stjórarnir eru to ikki teir einastu sum hava blanda arbeiði og privatar íløgur saman. Í vikuni kundu Sysla og Offshore.no avdúka at eisini leiðandi starvsfólk í Petroleumseftirlitinum og í Oljustýrinum, sum er undir Oljumálaráðnum, eisini áttu partabrøv í Statoil.

Norski oljumálaráðharrin, Tord Lien, sigur at etisku reglugerðirnar eru greiðar, og ikki til at misskilja. Eitt starvsfólk kann ikki eiga í feløgum sum tað skal hava eftirlit við.